## Gert um politikk

- Eg fylgi ikki serliga væl við. Eg eri sambandsmaður, men ikki so øgiliga virkin. Vit plaga ofta at lurta at tíðundunum á miðdegi, og so kjakast vit á arbeiðsplássinum um tey mál, sum eru uppi.



## Gert um hondbólt í Føroyum

- Støðið er lækkað síðstu 10 árini. Eitt dømi um tað er, at Høgni Klein kemur heim miðskeiðis í kappingini og avger tað heila, hóast hann ikki var í dystarvenjing. Kappingin í ár er tó spennandi, og tað er stuttligt, at fleiri lið er við í stríðnum um meistaraheitið.

## Gert & Arnbjørn Hansen:

# Brøðurnir kunnu ikki vera

**Kollfirðingarnir Gert og Arnbjørn Hansen eru brøður. Teir spæla báðir hondbólt við KÍF og fótbólt við EB-Streymi. Teir fylgjast altíð og eru felags um mest sum alt**

### Ítróttarprofilurin



**Heini S. Kristiansen**
heinik@sosialurin.fo

Sosialurin kemur inn á gólvið hjá Kitty og Holger Hansen í Kollafirði. Synirnir hjá teimum, Arnbjørn og Gert, sita og hyggja at Champions League fótbólti. Teir eru nevniliga allir ídnir Manchester United fjepparar.

Dysturin nærkaðist hálvleikinum, og teir vóru væl nøgdir við støðuna tá. Í hálvleikinum byrjaðu vit at práta.

### Spæla hondbólt og fótbólt

Gert Hansen er ein av bestu strikuspælarum í landinum. Hann spælir saman við beiggjanum Arnbjørn við KÍF.

Teir spæla eisini báðir fótbólt við EB-Streymi. Arnbjørn er áleypari, meðan Gert spælir høgri bakkur. Gert hevur verið fastur maður hjá KÍF og EB-Streymi í nøkur ár, meðan Arnbjørn veruliga beit seg fastan í álopinum hjá EB-Streymi.

Hann varð løntur fyri sítt góða kappingarár við heiðurinum "ársins stjørnuskot". Hann varð eisini úttikin til landsliðið.

- Vit hava altíð íðkað hondbólt og fótbólt. Tað var eingin trupulleiki fyrr, men nú er tað eitt sindur torførari, sigur Gert.

### Fótbólturin fyrstu raðfesting

Teir eru báðir samdir um, at fótbólturin hevur fyrstu raðfesting. Teir venja einans við KÍF eina ferð um vikuna. Hinar dagarnar venja teir fótbólt.

- Vit taka fótbóltin framum. Har eru sáttmálar uppií, og tað eru fleiri møguleikar og avbjóðingar í fótbóltinum, sigur Arnbjørn.

- Hondbólturin hevur mest verið hugni. Eisini hava vit hildið okkum í form um veturin við at spæla hondbólt, sigur Gert.

Arnbjørn er givin við hondbóltinum, eftir at hann fekk ein skaða. Gert viðurkennir eisini, at hann helst einaferð má velja hondbóltin frá.

- Eg eri við nú fyri at hjálpa teimum. Fótbólturin krevur meira og meira, so einaferð má hondbólturin helst víkja, sigur Gert.

### Arnbjørn roynt seg í HB

Arnbjørn spældi nøkur av dreingjaárunum við HB. Hann valdi tó at venda aftur til sundalagið og EB-Streym.

- Eg spældi altíð við teimum eldru, og eg vildi fegin royna at spæla á liði saman við javnaldrum. Tí skifti eg til HB. Eb-Streymur ringdi til mín, tá ið eg var vorðin eldri og søgdu, at teir vildu fegin hava meg aftur. Tá var eg troyttur av at vera í Havn, so eg valdi




*- Vit hava altíð íðkað hondbólt og fótbólt. Tað var eingin trupulleiki fyrr, men nú er tað eitt sindur torførari, sigur Gert Hansen, sum*

at venda aftur til EB-Streym, sigur Arnbjørn.

### Eru altíð saman

Gert og Arnbjørn hava altíð fylgst allastaðni. Av tí sama kenna teir hvønn annan væl, og tað sæst eisini aftur á fótbóltsvøllinum.

- Vit kenna hvønn annan betri, enn vit kenna hinar viðleikararnar. Vit hava spælt fótbólt saman, síðani vit vóru heilt lítlir, so eg kenni renningarlagið og tílíkt hjá Arnbjørn, sigur Gert og leggur afturat:

- Vit eru mest sum altíð saman. Tað hevur altíð verið so. Vit fylgjast eisini, tá ið vit fara út í vikuskiftinum. Vit hava tað gott saman og hava ongantíð veruliga verið óðir inn á hvønn annan, sigur hann.

- Nú er Gert so vorðin forlovaður, so hann er ofta burtur í vikuskiftinum. Men vit spæla

Sosialurin